# Bilar

Nr. 141 • hósdagur • 31. juli 2003 • 77. árg.

# Ólavsøkuframsýningin hjá Føroya Ellisakførum




*Nakrar hundrað myndir vóru eisini á framsýningini. Talan var um myndir hjá Føroya Ellisakførum og hjá Birgari Johannessen*



*Gamli Ford TT lastbilurin frá 1922 hjá Vatnsoyra Bilasavni er altíð áhugaverdur.*



*Hesin "Standard 8" frá 50-unum vakti stóran áhuga millum tey vitjandi, serliga hjá teimum eldru, sum minnast, tá hesir bilar hoyrdu til vanligu gøtumyndina, bæði sum persón- og vørubilar*

**Á ólavsøku skipaði áhugafelagið Føroya Ellisakfør fyri stórari framsýning av gomlum bilum og motorsúkklum í hølunum hjá P/F Wenzel í Havn. Í ár eru liðin 100 ár síðan Ford Motor Company varð stovnað**

FRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*

Síðan áhugafelagið Føroya Ellisakfør bleiv stovnað í 1992 hevur við jøvnum millumbilum verið skipað fyri ymiskum framsýningum á ólavsøku. Eitt árið hevði felagið vitjan av íslendskum ellisakførum, tá var framsýningin í hølunum hjá Berg Motors á Hálsi. Í 1997 varð framsýningin í bygninginum hjá Postverki Føroya á Óðinshædd, tá varð eisini skipað fyri go-kart koyring. Eitt árið var ein motorsúkkluframsýning í hølunum hjá P/F Meinhardt Arge á Hálsi.

Í sambandi við at Ford Motor Company fylti 100 ár í ár, varð framsýningin hesaferð í hølunum hjá P/F Wenzel á Akranesgøtu. Umframt fleiri gamlar Ford bilar vóru eisini nógvir aðrir bilar og gamlar motorsúkklur. Til dømis vóru allir Ford bilarnir hjá Vatnsoyra Bilasavni við á framsýningini, sum varð væl vitjað. Eitt av endamálunum við hesi framsýning var at savna pening inn til at seta gamla vatnbrunnin undir Gráasteini í Havn í stand til eitt tekniskt savn.




*Motorsúkklurnar og knallertirnar vóru nógvar í tali*






*Nýggi BMW-6 sær út til at vera ein coupé útgáva av 5-røðini, sum júst nú er komin á marknaðin*

# BMW 6 kemur aftur

**Í 1989 steðgaði framleiðslan av 6-røðini hjá BMW, sum var ein coupé útgáva av 7-røðini. Seinni í ár kemur ein nýggjur BMW-6 á marknaðin. Bilurin er ein 2+2 luksuscoupé í umleið somu støðd sum nýggja 5-røðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í hølunum á nýggja BMW-5, sum júst nú er komin á marknaðin, kemur ein BMW-6, sum er ein luksuscoupé, ið skal kappast við bil bilar sum Mercedes CLK og Maserati GT. Tað at bilurin er ein 2+2 vil siga, at pláss er til tvey vaksin og tvey børn. Meira er gjørt burtur úr designinum á bilinum enn tað at hava gott pláss til tey ferðandi á baksetrinum, men sagt verður frá BMW, at tað hóast alt verður rímiliga gott pláss aftan. Annars líkist bilurin tí nýggju 5-røðini innan. BMW-6 verður ein elegantur coupé við koyrieginleikum í toppklassa og allari tí nýggjastu elektronisku útgerðini hjá BMW. Í fyrstu atløgu kemur hann sum 645i við 4,4 litur V8 motori við 333 hk, sum koyrir frá 0-100 upp á 5,6 sek. Seinni koma teir við 3,5 litur V8 motori við 272 hk og 3,0 litur 6 syl. við 231 hk. Ein M6 við V10 motori og 500 hk kemur eisini á marknaðin.



*Innan líkist bilurin BMW-5, kanska meira sportligur*



*BMW 645i. Ein luksuscoupé við sera elegantum designi*

## Elantra facelift



Tann Hyundai Elantra, sum kom á marknaðin í 2000, verður nú nakað broyttur bæði framman og aftan. Elantra fæst nú eisini við 2,0 litur bensinmotori við 143 hk og 2,0 litur common-rail dieselmotori við 112 hk

*Kelda: Bil Magasinet*

## Indiskur Rover



Rover í Onglandi hava gjørt avtalu við indisku Tata bilverksmiðjuna um at samstarva um ein nýggjan minibil. Úrslitið er hesin CityRover, sum skal kappast við bilar sum t.d. Ford Ka og Opel Agila. Motorurin er ein 1,4 litur bensin við 85 hk

*Kelda: Bil Magasinet*

## Fabia diesel



Skoda Fabia fæst nú við einum 1,4 litur 3 syl. pumpu/dysu innspræningsmotori við 75 hk. Við hesum TDI motorinum koyrir Fabia nú 21,7 km/l, og frá 0-100 km/t upp á 14,4 sek. Toppferðin er 170 km/t

*Kelda: Bil Magasinet*